# GRÁTT ER HOT

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

**SUMMAR 2008: Grátt verður tað allar hottasta í summar. Grátt í øllum litbrøgdum, bæði til toy, metal, leður og keramikk. Gráa rákið endurspeglar ábyrgdarkenslu og tað samvitskufulla. Men tað stendur ikki einsamalt, tá tað verður kryddað við sterkum litum, sum endurspegla bjartskygni og vón**



*Mette Ditmer*



*Mette Ditmer*



*trine fournais*

## MIX, MATCH OG SMASH

2008 verður árið, har vit fara burtur frá at innrætta heimið við einum ávísinum tema. Nú skalt tú ikki longur velja, um tú ert romantisk, nordisk ella minimalistisk. Eins og við klædnamótanum, ber til at mixa ymisk snið, tilfar, toy og litir, akkurát sum tú vilt hava tað. Við fjølbroyttum kontrastum vísa vit sjálvsikkurheit og kreativitet.



*Tam-Tam krakkar*

## GRØNT VERÐUR AFTURLØNT



Eco-vinarligt design, vistfrøðiligar og natúrligar vørur og innrætting, við fokus á endur- og afturnýtslu. Við hækkandi oljuprísum, fíggjarligum ótryggleika og øktari tilvitan um umhvørvi, eru bæði keypiorkan og -viljin broytt síðsta árið. Tí er allar fremsti heimatrendurin í 2008 samvitskufult design við burðardyggari framleiðslu og flutningi.
Tvey dømi um endurnýtslu: Omanfyri: *Gomlu vinylskivurnar gera enn gagn - Vintage Record Bowl*
*Gráu NOBODY stólarnir eru úr formpressaðum plasti frá brúktum plastfløskum.* Stólurin hevur fingið fleiri viðurkenningar. Millum annað "Best Nordic product design 2008" frá The Forum AID Award, og "Designs of the Year" frá London Design Museum.
*Komplot v. Hay*





*Charles & Ray Eames - Vitra, 2004*

## NÝTT GAMALT

Í 2008 fara vit at síggja gamalt innbúgv við einum modernaðum tvisti – til dømis eina nútímansgerð av ommusliga ruggustólinum ella tunga barokkborðið í einari lættari útgávu. Vit fara eisini at síggja ein trend við, at innbúgvið skal hava fleiri funktiónir, sum kunnu lætta um mangan strongda gerandisdagin, so hann verður meira skipaður.



*Qualy - Happy lamp*

## FJØLBROYTT TILFAR OG LITIR

Hvít og kremlitt minimalisma má lúta fyri bjartari litum, toy av alskyns slagi og "lag á lag". Inn koma heitir og klárir litir, øll sløg av træi og korki. Svart og hvítt heldur fram, men nú saman við gulum, lime, appilsingulum, kiwi og tangarin, meðan blátt framvegis verður fremsti liturin til heimið.



*Frydendahl*

*www.boxdelux.dk*
*www.janfrydendahl.dk*
*www.elsewares.com*
*www.flowerme.dk*
*www.hay.dk*

**Heimið** februar 2008 • **Blaðstjórn:** Rigmor Dam, rigmor@sosialurin.fo • **Myndir:** Álvur Haraldsen og Jens Kristian Vang • **Lýsingar:** Gudny Langgaard, gudny@sosialurin.fo
**Uppseting:** Simona Weihe • **Útgevari:** Sp/f Sosialurin, post@sosialurin.fo - www.sosialurin.fo